Tórshavn, 11. oktober 2025
**Tíðindaskriv frá Mentanargrunni Landsins**

# 12 filmsverkætlanir fingið stuðul

Til triðja stuðulsumfarið í ár, Filmur III. 2025, hevur nevndin í Mentanargrunni Landsins tikið avgerð um at veita hesum 12 filmsverkætlanunum stuðul:

| Verkætlan | Slag | Umsøkjari | Kr. |
|---|---|---|---|
| Mammuskepilsið | Stuttfilmur | Maria Tórgarð | 31.000 |
| Hiðanífrá | Stuttfilmur | Barbara Lervig | 35.000 |
| Tað er ikki synd í mær | Stuttfilmur | Eir í Ólavsstovu | 50.000 |
| $elfie 2.0 postproduktion | Sendirøð | Gorm Just | 50.000 |
| Seinasta Paradís á Jørð | Spælifilmur | Sakaris Fríði Stórá | 14.000 |
| Bastardarnir - teir óynsktu | Spælifilmur | Hjálmar Dam | 50.000 |
| Birk | Spælifilmur | Jón Hammer | 200.000 |
| 93 - Ekko fra et Kollaps | Heimildarfilmur | Rikke Tambo Andersen | 150.000 |
| F.O.: Eitt "Føroyingur, Joe" Brot | Stuttfilmur | Bjørn Ulvedal Simonsen | 50.000 |
| Into the Heart / Eitt sindur um hvussu vit elska | Spælifilmur | Jón Hammer | 50.000 |
| Syng: Sangurin í kroppinum (arbeiðsheiti) | Heimildarfilmur | Gudmund Helmsdal | 100.000 |
| Havsins Handverk – Fiskur fyri Framtíðina | Heimildarfilmur | Jørgen Neshamar-Asmussen | 50.000 |

Stuðulsupphæddin, ið lutað verður út í hesum umfarinum, er 830.000 kr.

18 umsóknir komu inn til hetta triðja stuðulsumfarið, sum søktu um tilsamans 3.137.372 kr.

Endamálið við stuðulsjáttanini er at framleiða og menna føroyskan film við denti á fiktiónsfilm, heimildarfilm og listafilm.

Nevndin hevur viðgjørt umsóknirnar eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum er broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2015 og kunngerð nr. 3 frá 6. januar 2025.

Við nýggju kunngerðini um stuðul til film frá 6. januar 2025 er tað Mentanargrunnur Landsins, sum umsitur stuðulsjáttanina til film. Sum kunngerðin ásetur, hevur grunnurin sett tveir filmsráðgevar at meta um og gera tilmæli til grunnin. Avgerðin hjá nevndini um hvør fær stuðul til film, er bygd á tilmæli frá ráðgevunum.

Samlaða filmsjáttanin fyri 2025 eru 4,6 mió. kr. Stuðul til film verður veittur fýra ferðir árliga.

Vegna nevndina

Hedvig Westerlund-Kapnas, forfólk
Mentanargrunnur Landsins

MENTANARGRUNNUR LANDSINS
LÜTZENSTRØÐ 4 - FO-100 TÓRSHAVN - MENTAN@MENTANARGRUNNUR.FO - TLF. 320842 - 220845